# Kvinnudagur í Norðurlandahúsinum

*Mikukvøldið skipaði Kvinnufelagið í Havn fyri haldi í sambandi við altjóða kvinnudagin 8. marts. Upplestur, sangur og fyrilestrar vóru á skránni og undirtøkan var á góðari leið, sigur Bertóra Hanusardóttir*

SVEINUR TRÓNDARSON

Mikudagurin var altjóða kvinnudagur og sum siður er skipaði kvinnufelagið í Havn fyri tiltakið í Norðurlandahúsinum í Havn um kvøldið.

Felagið hevði fingið teir báðar kvinnuligu prestarnar, Marjuna Bæk og Ingu Poulsen Dam, at halda fyrilestur og harafturat var sangur og tónleikur á skránni. Aftaná sjálvt haldið var høvið hjá luttakarunum at seta seg niður við einum kaffikoppi og einum køkubita og fáa eitt prát.

Um 100 kvinnur høvdu leitað sær niðan í Norðurlandahúsið og hóast undirtøkan tí ikki var so stór, so letur Bergtóra Hanussardóttir sera væl at tiltakinum.

**Áhugaverdir fyrilestrar**

Marjun Bæk las »Evas brev til Gud«, sum hon sjálv hevur týtt, og Inga Poulsen Dam helt fyrilestur um kvinnuna innan kirkjugátt.

– Fyrilestrarnir vóru serstakliga áhugaverdir og ógvuliga viðkomandi í sambandi við stríð kvinnunar um javnstøðu, greiðir Bergtóra frá.

Áðrenn og aftaná fyrilesturin var tónleikur og sangur á skránni, og sum tað sømir seg á kvinnudegnum var bara talan um kvinnulig tónleikarar.

– Andrea Morensen, klaver, og Gudný Næs, violin, framførdu »Ave Maria« og eitt stykki úr »Ofreus og Euridiku«, meðan Gunhild V. Michelsen, Gunnvør Poulsen, Sanna W. í Brekkunum og Randi Hansen sungu nakrar sangir.

**Framhaldandi stóran týdning**

Tá vit spyrja Bergtóru um týdningurin av kvinnudegnum ikki so spakuliga er við at fjara burtur, nú so nógv verður gjørt við javnstøðu er hon púra avgjørd.

– Týdningurin hevur ongantíð verið størri enn hann er nú, tí hóast onkrar umstøður hjá kvinnum eru batnaðar, so er eisin igingið øvugtan veg á øðrum økjum, sigur hon.

– Harðskapurin móti kvinnum hevur ongantíð verið verri enn hann er nú, og tað eiga vit at berjast fyri, sigur Bergtóra Hanussardóttir, sum sostatt er púra avgjørd um, at kvinnurørslan er neyðug enn sum áður.

Men tað tekur tíð at fáa fólk at broyta sína uppfatan av sær sjálvum, heldur hon.

– Men málini verða sjálvandi dagført so hvørt sum vit røkka teimum, sigur Bergtóra at enda.



*Um 100 kvinnur høvdu leitað sær niðan í Norðurlandahúsið og hóast undirtøkan tí ikki var so stór, so letur Bergtóra Hanussardóttir sera væl at tiltakinum*

**Mynd: Jens Kristian Vang**

# Viðfestis-vognurin steðgaði ikki

SVEINUR TRÓNDARSON

Ein viðfestisvognur, sum júst var tikin av einum trailara, fór á rull á økinum millum Saltsøluna og Shell í gjár.

Menn høvdu júst koblað vognin frá trailaranum og eftir røttum átti hann at steðga av sær sjálvum, men tað gjørdi hann ikki.

Hann fór á rull og rendi inn í fimm bilar, sum stóðu parkeraðir á bryggjuøkinum. Sum tað sæst á myndunum, var tað rættiliga rótut á bryggjuni hesa løtuna og bilarnir, sum vórðu árendir, fingu rættiliga stóran skaða.



# Lógir sum fyriskriva mannagongdina um hópuppsagnir

*Við fráboðan í góðari tíð fáa allir partar betri møguleikar at royna at loysa teir trupulleikar, ið standast av hópuppsagnum, sigur Hans Pauli Strøm m.a. í viðmerkingum til uppskot*

ÓLAVUR Í BEITI

Hans Pauli Strøm hevur vegna Javnaðarflokkin lagt uppskot fram um fráboðan í sambandi við hópuppsagnir. Í viðmerkingunum sigur Hans Pauli Strøm, at í flestu londum, vit annars samanbera okkum við, eru ymsar lógarásetingar, sum verja løntakaran m.a. í sambandi við uppsagnir. Í hesum føri snýr tað seg um lógir, sum fyriskriva mannagongdina, tá talan er um hópuppsagnir.

– Slík løggáva finst ikki í Føroyum, hóast tað ikki er minni tørvur á tí her, og tí kann ikki drálast longur við at fáa hesi viðurskifti í rættlag hjá okkum, sigur Hans Pauli Strøm.

Sambært viðmerkingunum er talan um hópuppsagnir, tá ið fleiri løntakarar á sama virki ella stovni verða sagdir upp í einum. Tað kann verða niður í 8, 12 ella 16 løntakarar, alt eftir støddina á virkinum ella stovninum.

**Løntakarin verjast**

Hans Pauli Strøm sigur víðari í viðmerkingunum, at tað var serliga fyrst í nítiárunum, at løntakarar ofta komu illa fyri av hópuppsagnum. Og hópuppsagnir koma enn fyri, bæði á privata og á almenna arbeiðsmarknaðinum. Tær sera álvarsligu avleiðingar, sum slíkar hópuppsagnir vanliga kunnu hava fyri løntakarar og familjur teirra, gera tað neyðugt við lógarásetingum, sum kunnu verja løntakarar í samband við slíkar hópuppsagnir.

– Endamálið við hesum lógaruppskoti, sum er orðað við støði í reglum, sum eru galdandi í grannalondum okkara, er at áleggja arbeiðsgevarum skyldu at boða løntakarunum, fakfeløgum teirra og Arbeiðsloysisskipanini frá ætlaðum hópuppsagnum í góðari tíð frammanundan, í minsta lagi 30 dagar. Við fráboðan í góðari tíð fáa allir partar betri møguleikar at royna at loysa teir trupulleikar, ið standast av hópuppsagnum, bæði partarnar á arbeiðsplássinum sjálvum, feløgini og arbeiðsávísingin hjá Arbeiðsloysisskipanini.

– Tað er tann størsti og veikasti bólkurin av løntakarum á arbeiðsmarknaðinum, sum ikki eru tryggjaði við slíkum avtalum um fráboðanar- og uppsagnarreglur, - og her eru tað fyrst og fremst øll tey tímaløntu, sum hava størst gagn og størstan tørv á at lógarfesta tær mannagongdir, sum verða ásettar í hesum lógaruppskoti, sigur Hans Pauli Strøm m.a. í viðmerkingum.

Lógaruppskot líkt hesum varð lagt fram á Føroya Løgting tann 5. mars 1998 av Ingeborg Vinther, løgtingslimi, vegna Verkamannafylkingina. Eftir 1. viðgerð tann 17. mars 1998 varð tað beint í Trivnaðarnevndina. Málið fall burtur, tí løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.



